# Heldur íløgur enn skattalætta

Flestu danir halda, at tað almenna eigur at brúka meiri pengar til íløgur heldur enn skattalætta. Í einari kanning, sum Megafon hevur gjørt fyri Politiken, siga 57 prosent av teimum spurdu, at politikararnir eiga at brúka meiri pengar til íløgur til at umbyggja og umvæla skúlar, ellisheim og sjúkrahús fyri at útvega fleiri arbeiðspláss. 36 prosent vilja heldur hava skattalætta, so tey fáa meiri pengar til nýtslu. Hesi fáa sín vilja. Í ár hava politikararnir játtað 9 milliardir krónur í skattalætta, 30 milliardir kunnu takast út úr serligu pensjónsuppsparingini, og harafturat koma 14 milliardir í skattalætta.



# Fleiri kvinnur í politikk

Tað gongur tann rætta vegin við at fáa grønlendskar kvinnur at taka lut í tí politiska lívinum. Enn eru kvinnurnar kortini ov fáar sammett við mennninar, og tí bleiv skipað fyri einari ráðstevnu í Nuuk um vikuskiftið, hvørs endamál var at eggja kvinnum til at fara upp í politikk. Aleqa Hammon (myndin) úr Siumut, sum var ein av fyrirerikarunum, sigur við kringvarpið KNR, at kvinnur hava eginleikar, sum menn ikki hava, og at tær síggja mál á ein annan hátt enn menn. Tí hevði tað tænt samfelagnum, um fleiri kvinnur vóru við í teirri politisku viðgerðini, sigur hon.



*Linda Andrews hevur verið í røttum ódnarveðrið seinastu tíðina í samband við X-Factor kappingina, og greiddi hon millum annað frá sínum upplivingum við Blachmann og hinum luttakarunum í kappingini. Fjeppararnir vóru nógvir í tali, og fingu teir autografar og eina frálíka konsert*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

meg uppá orðið, og eg meldaði meg til.

Linda sigur, at tá hon fór til upptøku, hevði hon bara hug at goyma seg millum tey mongu í bíðiraðini.

- Eg var so bangin fyri at fáa at vita, at eg skuldi bara vera heima og vera mamma. Tí eri eg sera glað fyri at vinkonurnar fingu meg avstað, og at dóttirin yvirtalaði meg.

### Hvat geri eg skeivt?

Í fyrsta umfarinum kendi Linda seg sum eitt barn í einum stórum handli. Hon kendi seg tryggan við sínum sangi, men var harafturímóti ótrygg við hvussu hon skuldi flyta seg á pallinum, hvat kamera hon skuldi hyggja í og so framvegis. Hon er kortini vaksin við uppgávuni seinastu vikurnar.

- Tað kennist fullstendiga fantastiskt at standa á pallinum í X-Factor. Tað kennist betri enn nakar dreymur, sum ein altíð hevur havt. Eg havi verið nøgd við mínar framførslur, men eg havi fingið viðmerkingar, sum eg ikki havi vitað, hvussu eg skuldi taka. Eg hugsaði, at tað er líka mikið hvat eg geri, tí teir fara ikki at dáma meg álíkavæl. Eg havi sungið fýra ymiskar sangir, nú frati eg á tað heila, og eg syngi bara. Og tá elskaðu teir meg.

Nøkur ting hava verið eitt sindur torfør fyri hana at góðtaka.

- Eg havi fingið kritikk fyri at syngja ov væl. Hvussu kann tað vera negativt? Fyri ein sum meg, sum eri ein kempari er tað viktigt við mótgangi, tí eg blívi so fratør. Hetta hevur so nógv at siga fyri meg. Hvat geri eg skeivt? Og tá alt kom til alt, gav Blachmann mær tað bestu vikuna, sigur hon og smílist.

- Mann kann siga tingini uppá ein penan máta. Men eg eri glað fyri at føroyingar ikki fóru á sama støði sum Blachmann.

Hon var í sendingini hjá Rás2 biðin um at geva sítt boð uppá hvør var besti dómarin. Tá var hon ikki í iva.

- Lina er besti dómarin. Fólk skulu uppmuntrast. Ikki hálast niður.



## Per Zachariasen, framleiðslustjóri hjá blu:

**- Tað var mín uppgáva at finna dómarar til sendingina, og vit hildu tað vera umráðandi at hava Blachmann við. Vit kenna Blachmann frá fyrr, hann er umráðandi, tí hann er so kontroversiellur.Tað er ein partur av spælinum, at mann sleppur at viðmerkja hvønn annan. Ikki altíð teir meina tað, men teir provokera. Mann skal ikki taka Blachmann so alvorligt altíð. Hann sigur tingini sum tey eru. Tí eru vit ótrúliga glað fyri at hann er við. Tað er DR eisini.**